# BØNARLØTAN

September 2018 33. árg.

## *1. Leygardagur* *1. Mós. 40.1-23*




*Umborð á Juvel II 27. aug.*

### GRØNLAND
### Juvel II

16. - 28. aug. vitjaði Juvel II saman við sangbólki úr Ebenezer allar býir og bygdir í Suðurgrønlandi við evangeliinum. Serliga gleðiligt, at nógv fólk komu á møti í Igaliku. Tey vitjaðu eisini umborð.

## ZAREPTA

27. aug. - 2. sept. bíbliuskeið, 7. - 9. sept. kvinnustevna, 14. - 16. sept. mansstevna, 21. - 23. sept. hjúnastevna I, 28. - 30. sept. hjúnastevna II. Minnist leiðsluna, Jákup Olsen, Mariu á Lakjuni Simonsen, Jens Bech, Miriam Rasmussen, og tænastuna, at Harrin gevur vísdóm, styrki og ávøkst.

## KRINGVARPIÐ

23. sept. sjónvarpsmøti, Elim, Søldarfjørður

## R7 (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Føroysk møti í Jútlandi

1. sept. kl. 19 í Bethaniakirken,
Dag Hammarskjøldsgade 2A, Aalborg
8. sept, kl. 19 í „Livets kilde“. Vit møtast í
Ådalsparken 33, 6705 Esbjerg

## *2. Sunnudagur* *Róm. 9.1-13*

## FØROYAR

### Birgit og Svenning av Lofti

Báðar ferðirnar við føroyingum til Ísraels í ár eydnaðust væl, nøkur vórðu eisini doypt. Ólavsøkutiltakið í Ebenezer 27. juli við sersangi, felagssangi og tónleiki gekk sera væl við fullsettum húsi. Ætlanin er aftur at hava slíkt tiltak 27. juli 2019. Biðið fyri okkum, nú vit leggja ætlanir á evangeliska økinum í heyst, vetur og fram móti sumri 2019. Verið vælkomin at ringja tlf. 212045, um tit ynskja hjálp at skipa fyri evangeliskum tiltaki í heimbygd tykkara.

## *3. Mánadagur* *1. Mós. 41.1-24*



### ATLANTIC MISSION

Evangeliseringsferðin og samkomuvitjanin í Orknoyum í summar við Juvel II gekk sera væl. Vit hava frætt um menniskju, sum Harrin kallaði at taka andaliga avgerð. Biðið, at nevndin fyri Atlantic Mission fær náði frá Gudi at taka rætta avgerð, hvagar farast skal í apríl-mai 2019. Ring til Svenning av Lofti tel. 212045, um tú hevur spurningar!

### FØROYAR
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Maria og Jens Bech**

## *4. Týsdagur* *Róm. 9.14-33*

### SENEGAL, Tongia, Lív Poulsen

Eg verði ætlandi aftur í Senegal 6. sept. eftir summarfrí heima. Míni samverkafólk, sum skuldu koma úr farloyvi í nov., verða ikki aftur fyrr enn í jan. Næstu mánaðirnar búgvi eg tí á gestaheimi hjá NTM í býi longur eysturi í landinum og arbeiði við bíbliuumsetingini. Vónandi sleppi eg inn í bygdina seinni í árinum nakrar vikur. Biðið, at regntíðin eisini verður góð í sept. og okt.

### DANMARK, Kolding, Jan og Anne Zachariassen

Vit hava havt framsýning á norðurlendskari mentanarstevnu í Keypmannahavn. Nógv tosaðu við okkum, tá vit vístu evangeliska boðskapin á video. 4. - 11. sept. eri eg í Týsklandi á stevnu saman við tveimum, sum eru sjónveik og deyv, har vit skiftast um at tulka.

## *5. Mikudagur* *1. Mós. 41.25-40*



**DANMARK**
**Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 10, Andreas 9, Kristina 7**

Eftir summarsteðgin fyllist Kristnastova nú aftur við ungum lesandi. Vit eru glað at vera afturkomin og vóna, at heystið og veturin verða andaliga mennandi fyri okkum øll. Kristnastova hevur facebookvanga, har sagt verður frá arbeiði og tiltøkum.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Hósdagur* *Sálmur 8*



**NTM FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 7, Tabita 4, Debora 2**

Nýtt skúlaár byrjar á North Cotes College fyrst í sept. Biðið, at lærarar fáa styrki og vísdóm at undirvísa, og at næmingarnir fáa náði at vaksa í trúnni.



**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 11, Svend 9, Terji 6, Petra 4**

## *7. Fríggjadagur* *Róm. 10.1-21*



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 14, Victoria, 12, Emma Grace 10, Jónatan 8, Markus 6, Evita Linda 3, Joy Hanna 1**

Tíðin í Oregon var lívgandi andaliga og likamliga. Legurnar í summar eydnaðust væl, og vit gleðast um, at minst tvær gentur komu til trúgv. Tað gongur væl at møtast í nýggja bygninginum. Biðið, at tað eydnast at gera hann lidnan.

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen, Ísak 15**

## *8. Leygardagur* *1. Mós. 41.41-57*



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**

Vit hava nakað av sambandi við eldra ættarliðið av føroyingum í Danmark. Mong eru knýtt at onkrari kristnari samkomu ella kirkju, men ikki øll. Biðið, at vit kunnu vera teimum til andaliga hjálp og vegleiðing. berghamar@kristnastova.dk



**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Miriam Joy 15, Noah 12, Lydia Sigrid 1**

## *9. Sunnudagur* *Róm. 11.1-21*

### FØROYAR
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 10**

Í juli vóru vit í Pakistan at vitja familju og síðan á Teenstreet. Ynski okkara er at fara við toymi til Pakistan hvørt ár. Nú byrja vit so aftur tænastuna í Føroyum við møtum, trúarverjubólkum og framløgum. Joy byrjar annað árið á miðnámi á Glasir, og Adonia fer í fimta flokk.



### FØROYAR
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 11**

## *10. Mándagur* *1. Mós. 42.1-17*



### ONGLAND, NTM North Cotes
**Erla og Ingvard Petersen, Natan 15**

Vit eru komin heim í farloyvi og búgva í Havn. Biðið, at vit nú finna okkum til rættis í føroyska samfelagnum eftir mong ár uttanlands. Biðið serliga, at Natan skal trívast í 9. flokki í Eysturskúlanum.

### ONGLAND, NTM North Cotes
**Julie og Sonni Poulsen**

Ætlandi verða vit í USA í farloyvi til umleið mai 2019

★ Í dag fyllir Ezra Lukama 10 ár.

## *11. Týsdagur* *Róm. 11.22-36*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Hjartans takk fyri forbøn í summar, tí vit kendu Harrans signing á serligan hátt í Bolivia. Tað var ein serlig gleði at hoyra greiðan vitnisburð frá hjúnum úr ættarbólkinum, har NTM byrjaði arbeiðið, og har teir fyrstu fimm trúboðararnir hjá NTM lótu lív í 1942. Vit eru takksom at fáa nakrar vikur við hús í sept., tí seinni í ár og nakað inn í næsta ár verða vit fleiri mánaðir í Asia; men fyrst er ætlanin at vitja tvær samkomur og fleiri vinir í statinum Missouri, sum biðja regluliga fyri okkum.

## *12. Mikudagur* *1. Mós. 42.18-39*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Tað gekk væl hjá Annu á túrinum til Senegals í juni. Vit hittu vinir og grannar, ið vit búðu saman við í 12 ár. Vit merktu opinleika millum fólk. Kronologisk bíbliuundirvísing frá 1. Mós. til Ábraham er nú tøk í Senegal á SD-kortum. Tey kosta 20 kr. eintakið at framleiða. Umleið helvtin av saafi bygdunum kann nú hoyra bíbliuundirvísingina á kringvarpsstøð. Við størri sendara hevði borið til at rokkið fleiri bygdum.

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 12, Rebekah 10, Lydia 8**

Ein bólkur av kristnum kurdum í irakiska Kurdistan boðar nú gleðiboðskapin og kunnar um bíbliuappina. Craig vitjar tey fyri at tosa um samstarv.

## *13. Hósdagur* — *Sálmur 9*



### GRØNLAND, Qaqortoq
### Marjun og Páll Poulsen

Vit eru Harranum takksom fyri ávegis byggingina av starvsfólkahúsinum og legurnar, vit kundu hava í summar. Serliga glað fyri starvsfólk, tulkar eins og tykkum mongu, sum góvu, stuðlaðu og bóðu fyri okkum. 16. - 28. aug. vitjaði partur av sangkórinum í Ebenezer í samstarvi við Juvel II allar býir og bygdir í Suðurgrønlandi við evangeliinum. Hetta var fyrstu ferð, Marjun vitjaði allar bygdirnar – ein serlig uppliving fyri hana!

## *14. Fríggjadagur* — *Róm. 12.1-21*



### GRØNLAND, Nuuk, Epanezer
### Hans Sivertsen
### – Filip og Ane Sivertsen, Cecilie 14, Kristian 12
### – Óli og Anne-Sophie Tindalíð, Liljan 12, Leanna 11

Eftir 48 ár í tænastu Harrans í Grønlandi flytur Hans aftur til Føroya. Samkoman takkar fyri stóra arbeiðið, Hans og Jonna hava avrikað her, og teir lunnar, tey hava lagt undir verkið til okkum at byggja víðari á. Vit takka samkomum og einstaklingum fyri allan stuðul á barnalegunum, bæði teimum, sum eru komin yvir at hjálpa, og teimum, sum hava biðið, givið mat og stuðlað fíggjarliga. Nú eru vit farin undir aftur barna- og ungdómsarbeiðið í Epanezer – mánadagar børn 9-12 ár og týskvøld 13 ár og eldri. Vit eru fáment og takka fyri forbøn.

## *15. Leygardagur* *1. Mós. 43.1-33*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Ferðin við Qaamaneq til Grønlands má útsetast til næsta ár orsakað av umvælingum umframt skaða, sum Daniel fekk í knæið. At fáa ríkisborgararætt hjá Solveig í USA tekur helst fleiri mánaðir afturat. Vit vóna at vera aftur í Grønlandi síðst í árinum.

★ Í dag fyllir Kano Mortensen 9 ár og Sigrid Nónstein 11 ár.

## *16. Sunnudagur* *Rom. 13.1-14*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit eru takksom fyri summarið í Calvary, tí 940 børn komu á summarskúlan, og fleiri komu til trúgv. Eisini høvdu vit tvær vikur við tónleikalegu í juli við 150 børnum hvørja viku. Tey lærdu m.a. at syngja og tilbiðja. Nógv tiltøk byrja av nýggjum í sept.



**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Sonja 17, Timothy 17, Karina 16**

Eftir 18 ár í tænastu uttanlands eru vit komin aftur til Írlands. Vit eru framvegis í Asia-toyminum, men nýggja tænasta okkara í Global Service International (GSI) er at kunna um ónádd, fjarskotin menniskju, sum tað næstan er ómøguligt at náa við evangeliinum.

## *17. Mánadagur* *1. Mós. 44.1-17*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Biðið, nú vit rættlesa Ápostlasøguna, at vit megna at frambera sanna boðskapin í bókini, og at hvør einstakur toymislimur fær vísdóm.
⋆ Í dag fyllir Boas Lukama 5 ár.

## *18. Týsdagur* *Róm. 14.1-23*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Í Glostrup Frikirke eru vit farin undir nýtt tiltak egnað til lítlar samkomur. Nakrar ferðir um árið skiftast heim at bjóða øllum í samkomuni til lítla máltíð fríggjakvøld eftir arbeiðstíð. Tá er møguleiki hjá ungum og eldri at hittast, fáa eitt gott prát, læra hvørt annað at kenna, hjálpa hvørt øðrum, bjóða nýggjum við og at vísa gestablídni.



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**
Vit eru takksom fyri familjuvitjan í Onglandi og fyri heilsubót. Stephen fer til USA at undirvísa á skúla, sum sendir toymi til Turkalands. Hóast summar er talið á pakkum við bíbliubrævaskeiðum ikki minkað – í miðal 250 um vikuna.
⋆ Í dag fyllir Svend í Prestgarði 10 ár.

## 19. Mikudagur — 1. Mós. 44.18-34



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 16, Megan 13,**
**Trisha 6, Emma 2**

Í sept. í fjør flutti La Fonte samkoman í nýggj høli, tí hini vóru ov smá. Vit eru longu farin at leita eftir øðrum hølum, tí hesi eru eisini ov trong. Biðið, at Gud gevur okkum vísdóm.

**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

## 20. Hósdagur — Sálmur 10



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 1**

Samstarvsfelagar okkara koma ikki aftur fyrr enn komandi ár orsakað av heilsuni hjá syni teirra. Evangeliska bíbliuundirvísingin á skúlanum gongur væl, og áhugin er vaksandi á tekniska institutinum. Lærarin, sum Philip hevur arbeitt saman við, tekur alla undirvísingina, meðan vit eru í Kavieng at standa fyri einum gistingarhúsi í 3 vikur.

**USA, Nebraska, Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Rachel og Peter Hansen, Caleb 16**

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 6**

## *21. Fríggjdagur* *Róm. 15.1-13*



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 10, Noah 9, Karis 5,**
**Judah 3, Ethan 1**

Ætlandi verða vit í Skotlandi, til vit fáa arbeiðsloyvi og visa til PNG. Tað hastar, tí ferðaseðlar skulu bíleggjast. Vit vóna at koma til PNG fyrst í okt. Ímeðan ferðast vit og búgva í kuffertum; tað er hart hjá børnum okkara.

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 7, Leah Eve 4**

## *22. Leygardagur* *1. Mós. 45.1-28*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 14, Rebekka 13, Hanna 10**

Trygdin á Suðurpalawan er støðugt versnað síðstu tíðina. Hetta ger, at trúboðararnir, sum arbeiða har, mugu rýma. Tim hevur av somu orsøk avlýst fleiri túrar suðureftir. Hetta hindrar kortini ikki umsetingini av Gamla Testamenti.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

**FILIPSOYGGJAR, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

## *23. Sunnudagur* *Róm. 15.14-33*



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

Vit takka fyri allar vitjanir á Malta í summar. Ætlanin er frá aug. og árið út at hava tiltakið „I live“ fyri ung frá 10 ára aldri og uppeftir. Tá granska vit Emmaus bíbliuskeiðið „Hvat Bíblian lærir“ á donskum.

## *24. Mánadagur* *1. Mós. 46.1-34*



**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 14, Micah 11, Ezra 10,**
**Uhenya 7, Boas 5**

Vit takka Harranum fyri næmingarnar, sum vórðu lidnir í aug. Biðið fyri teimum, nú teir skulu taka stórar avgerðir fyri framtíðina. Nakrir fara víðari í skúla, men aðrir fáa ongantíð tann møguleikan.

## *25. Týsdagur* *Róm. 16.1-27*



**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 5, Micah 5**

Nógv nýggj fólk vitja samkomuna. Biðið, at tey, ið koma á gátt hjá okkum, kenna seg væl og verða signað av boðskapinum og samveru. Biðið, at vit fáa vísdóm og dirvi.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *26. Mikudagur* *1. Mós. 47.1-16*



**GUINEA VESTURAFRIKA,**
**Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Jens Allan 17, Ryan 9**

Vit eru takksom at vera saman við Allan hansara seinasta skúlaár her í Dakar. Marion hevur ábyrgdina at læra næmingarnar franskt, meðan lærarin er í farloyvi. Tað dámar henni væl. Biðið, at hon verður næmingunum góður lærari. Hans Arni arbeiðir á skrivstovuni hjá NTM næstu fýra mánaðirnar, meðan skrivstovumaðurin er í farloyvi.

## *27. Hósdagur* *Sálmur 11 og 12*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 9, Nana 6, Louie 4**

Hallur lærir japanskt. Biðið um vegleiðing, nú hann skal velja, hvørja leið hann skal taka. Kano og Nana byrja nú aftur í skúla eftir summarfrítíðina. Enn vita vit ikki um nakran annan kristnan á skúlanum. Biðið, at børnini finna kristnar vinir.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Selma Godtfred, Kristianna J. Heinesen, Jónvør Christiansen, Lea Wolles, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## *28. Fríggjdagur* *Matt. 19.1-15*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Christy og Dan Jacobsen**
**Justin 17, Jonathan 16, Leslie 16, Emily 8, Bethany 3**
Vit hava hjálpt nýggjari familju, sum skal tæna Harranum í Landsynningsasia. Okkara leiklutur hevur verið at ansa børnunum, meðan foreldrini hava verið á venjingarskeiðum. Okkum dámar væl at tæna á henda hátt, tí biðja vit um forbøn fyri familjuni Megli.

## *29. Leygardagur* *1. Mós. 47.17-31*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 13, Aron 6, Noah Kristian 4**
Stjórin í The Well International er farin úr starvi, og Sørin átekur sær hansara arbeiði eina tíð framyvir. Arbeiðið at stuðla trúboðarum um alt Asia er vaksandi.

**OM FØROYAR**
**Anita og Oddmar Tausen**

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *30. Sunnudagur* *Matt. 19.16-30*

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

### Nýggj bók!

**169 kr.**




Hvat kennist trupult? Framtíðin, trúarlívið, familjan ella kanska fíggjarviðurskiftini? Vit liva í ótryggum heimi. Í bókini Unshakable Hope, Building our Lives on the Promises of God greiðir Max Lucado frá teimum 12 mest týðandi bíbilsku lyftunum og vegleiðir um, hvussu vinnast kann á sorg og vónloysi, og hvussu vit kunnu finna nýggja meining, sum vinnur á ótta fyri framtíðini. Í lívinum eru trupulleikar, men í Bíbliuni finnur tú lyftini.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo